



Saman við Hilmar Eliasen í Colloseum



Saman við Eli Christiansen og Hilmari Eliasen uttanfyri olympiska leikvøllin




Champions League steypið



sangduelur – sangbardagi – fram millum ein flokk av Barca-fjepparum og ein flokk við United-fjepparum. Við slagsangum á enskum og katalonskum, royndu fjepparaflokkarnir at yvirdoyva hvønn annan. Ein United-fjeppari sum hevði dekan ov nógv innanborða – hóast Rom-forboðið? – var rættiliga aggresivur, men annars var talan um stuttligt argarí. Sangirnir hjá Barca-áskoðarunum vóru kortini meiri appelerandi. Teir tóku støðu í tí sum Barcelona og Barca kunna, meðan ensku slagsangirnir alt ov ofta taka støðið í, hvat ein heldur um onnur lið, enn eins egna. Fjepparnir royndu eisini at arga hvønn annan, við at rópa »Real Madrid« og »Manchester City« eftir hvørjum øðrum.

## Trongligt

Mikudagur var so dystardagur. Vit fóru fyrst oman í Colloseum fyri at uppliva serliga stemningin á matchfestival-økinum. Har var m.a. talan um ein serligan fótbóltsdyst við fleiri europeiskum legendum, so sum Ian Rush, Michael Laudrup, Rui Costa, Bryan Robson, Rudi Völler, Frank Rijkaard o.ø. sum á einum lítlum avmarkaðum vølli skuldu royna seg ímóti einum italskum veteranliði.

Tá ein fer til eina stóra finalu, er umráðandi at koma til dystin í góðari tíð, fyri at uppliva hvussu stemningurin verður bygdur upp. Vit høvdu eitt talgilt atgongumerki, sum samstundis kundi brúkast sum fríur ferðaseðil til metroina, sporvagnarnir og bussarnir í Rom. Talgilda atgongumerkið kundi brúkast til hetta endamálið dagin fyri dystin, sjálvan dystardagin, og dagin aftaná dystin. Metroin í Rom er altíð ovurfylt, og líður ein av klaustrofobia, so skal ein halda seg langt burtur frá henni.

Vit koyrdu fyrsta teinin við metroini, fyri síðani at taka sporvagnin tann síðsta teinin. Var trongt í metroini, so var verri í sporvagninum. Túrurin við sporvagninum fekk ein at hugsa um djóraflutning, og triðjaklassa tok í India. Eitt bar okkum kortini uppi á tí tronga túrinum, og var tað tann rungandi sangurin hjá Barca og United-áskoðarunum. Men umborð á sporvagninum bleiv lungakapasiteturin í so trongur.

## Við olympiska leikvøllin

Olympiski leikvøllurin í Rom var upprunaliga bygdur í 1930-árunum, sum ein partur av stóru Foro Italiano verkætlanini hjá einaræðisharranum, Benito Mussolini. Leikvøllurin var umbygdur til olympisku leikirnar, sum vóru í Rom í 1960. Mussolini var so óður um, at liðini í Torino og Milano skiftust um at vinna tað italska meistaraheitið, at hann gav boð um, at øll fótbóltsfeløg í Rom skuldu leggjast saman í eitt felag. Ítróttarmálaráðharrin hjá Mussolini var kortini ein Lazio-fjeppari, og tí slapp Lazio undan at leggja saman við øllum hinum liðunum í Rom.

Um aldarskiftið var olympiski leikvøllurin aftur umbygdur. Olympiski leikvøllurin er snøggur, men ikki líka snøggur sum Luzniki leikvøllurin í Moskva. Moskovittar dugdu eisini betur at skipa fyri finaluni, enn rómverjar. Í Moskva var frámerkingin nógv betri, enn í Rom, og tá ein kom til ta røttu seksjónina, var »linjuføringin« frá kontrolstøðunum og til sitiplássini nógv betri.

Í Rom máttu vit snúgva nakrar ferðir til vinstru og høgru, og so til vinstru aftur, áðrenn vit koma fram til rætta staðið. Komnir næstan á mál máttu vit bíða pent, tí onkur VIP-ari kom koyrandi eftir einum reyðum leypara. Slík forstýrandi element vóru heldur ikki í Moskva, tí har vórðu VIP-ararnir tiknir inn á einum serstakum øki, sum ikki breyt leiðina hjá fótbóltsfjepparunum. WC-viðurskiftini vóru heldur ikki líka nøktandi sum í Moskva, og betri pláss var fyri knøunum, tá ein sat á Luzniki leikvøllinum.

Ein hevði eina fatan av, at moskovittar vóru ovurstoltur um at vera vertsbýur fyri Champions League finaluna, meðan tað tóktist meira at vera ein sjálvfylgja fyri rómverjar, at teir vóru vertsbýur fyri ítróttarligu stórhendingini.

## Dysturin

Eitt var kortini betri á olympiska leikvøllinum, og tað var grasteppið. Á Luzniki var eitt grasteppið frá Slovakia lagt oman á fjórða ættarliðs graslíkisvøllin. Á olympiska leikvøllinum var talan um eitt fast inventar.

Áðrenn dystin var skipa fyri stuttligum kappingum, m.a. spurnarkappingum fyri at halda lagið gott á áskoðarunum. Barca og United-fjepparnir kláraðu tó í ríkiligt mát sjálvir at halda lív í stemninginum.

Loksins var klárt at byrja, sponsku meistarnir og steypavinnarnir, FC Barcelona ímóti ensku meistaranum, liga cup vinnaranum og heimsmeistarunum fyri felagslið, Manchester United. Hetta skuldi verða tað stóra brakið! Men annað liðið var satt at siga bara á vøllinum í átta minuttir. United byrjaði sum eitt ódnarveður, hevði nakrar málmøguleikar sum kundu givið mál, men so fær Barca sín fyrsta málmøguleika. Samuel Eto´o leggur Barca á odda 1-0 við einum góðum avriki, og satt at siga kom United ongantíð yvir hetta.

Taktiska uppleggið hjá Alex Ferguson – sum óivað var at koma á odda, og so verja og spæla kontra fyri rest – fór í knús. Og tá minsti – og besti – maðurin á vøllinum, argentinski Lionel Messi stútaði Barca á odda 2-0 var klokkan sligin. United hevði møguleikan beint aftaná at koma uppá 1-2, men aftaná tað var vatnið stongt. Barca vísti seg frá sínu bestu síðu, og teirra bóltførleiki var kappingarførur við alt annað listarfrøðiligt vit sóu í Rom. United vóru skelkandi vánaligir og óenskir í sínum spæli.

At enda sat ein og bara vónaði, at teir fóru at spæla »kick and rush« – bara fyri at gera okkurt, men teir vóru slignir uppá tekniskt »knock out«. Betra liðið í 82 minuttir vann á liðnum, sum bara var betri í átta minuttir. Og enn siti eg og ivist, um Wayne Rooney var við í dystinum. Men eg havi hoyrt aftaná, at hann byrjaði inni.

Finalan í Moskva var eitt nógv størri fótbóltsupplivilsi, tí tá vóru tvey góð lið á vøllinum, og tá var stórur dramatikkur við bæði umdysti og brotssparkskapping.

Dagin eftir finaluna vóru vit í Vatikaninum. Alex Ferguson er katolikkur, og eg royndi at kanna um hann var har. Ferguson var ikki har, men vónbrotnir írskir, ungarskir og føroyskir United-fjepparar, sum suffaðu um manglandi avrikið hjá Manchunia í Roma.

Føroysku fjeppararnir høvdu ein góðan túr í Rom, har teir skoðaðu mangan søguligan, mentanarligan og listarfrøðiligan vakurleika, men finalan í Champions League var »Barca, Veni, Vedi, Vichy« – Barca kom, sá og sigraði.